# Bachelorritgerðin

*- reglur og mannagongdir*

Fróðskaparsetur Føroya/Námsvísindadeildin

2023/24

## BACHELORVERKÆTLAN - TÍÐARÆTLAN 2024

| *Vika* | *Evni og avgreiðsla* | *Tíð og stað* |
|---|---|---|
| **Vika 10**<br><br>*(6. mars)* | **Kunning um BEd- verkætlanina fyri námsfrøðingalesandi** | **Mikudagur 6. mars frá kl. 14.30 – 16.00.**<br><br>**Stova: 41** |
| **Vika 10 til 11**<br>*(frá 6. mars – 14. mars)* | **Tey lesandi velja sær evni og fyribils spurdóm**<br><br>**Tey lesandi útfylla eitt talgilt oyðublað, sum liggur á serstakari Moodle stevnu** | **Stað**: Moodle<br><br>Oyðublaðið á Moodle skal fyllast út og skal latast inn á Moodle í seinasta lagi hósdag **14. mars kl. 23.59** |
| **Vika 12**<br>*(frá 18. – 22. mars)* | **Tey lesandi fáa boð um, hvør skal vegleiða teimum** | **Stað:** Moodle<br>**Mikudagin 20. mars** verður boðað frá, hvønn vegleiðara tey lesandi hava fingið tillutað. |
| **Vika 14**<br>*(frá 1. apríl – 5.apríl)* | **INNLEIÐSLA**<br>B.Ed - verkætlanin byrjar.<br>Vegleiðarin framsetir eitt uppskot til vegleiðingarætlan | Lesandi fær boð frá einstaka vegleiðaranum um, hvussu innleiðslan verður skipað, og nær og hvar hon verður hildin. |
| ***Vika 20*** | ***GG. Øll vegleiðing steðgar fríggjadagin 17. mai*** | |
| **Vika 21**<br>*(frá 20. mai. – 24. mai))* | **BEd-verkætlanin verður handað**<br><br>Námsvísindadeildin bjóðar kaffi og krás fríggjadagin 24. mai frá kl. 11.00 í kantinuni. | **Stað:** KANTINAN<br><br>**Ritgerðin verður handað:**<br>**Í seinasta lagi fríggjadagin 24. mai kl. 12.00**<br><br>• 3 pappírseintøk av ritgerðini verða latin inn.<br>• Teldutøkt eintak av ritgerðini, alt savnað í eitt pdf-skjal, skal latast inn á serstakari stevnu á Wiseflow.<br>• Teldutøkt eintak av ritgerðini skal sendast til nad@setur.fo<br><br>**Próvtøkuyvirlit verður handað:**<br>**Fríggjadagin 24. mai** fáa lesandi boð um, nær tey skulu til munnliga próvtøku, og hvar og hvussu próvtøkan verður hildin.<br><br>**Próvtøkuyvirlit verður lagt á Moodle** |
| **Vika 23**<br>*(frá 3. juni – 7. juni)* | **Munnlig próvtøka** - frá mánadegi til fríggjadag | **GG! Próvtøkuyvirlitið kann verða dagført** |
| **Vika 26**<br>(24. juni - 28. juni) | **Prógvhandan** | **Prógvhandaninin verður fríggjadagin 28. juni**<br><br>**Stað og tíðspunkt:** Kunnað verður nærri seinni |

# Bachelorritgerðin

Fjórða lestrarárið, bæði hjá lærarum og námsfrøðingum,endar við einari verkætlan, ið telur 15 ECTS-stig.
Verkætlanin verður framd samsvarandi endamálunum fyri útbúgving til B.Ed., antin innan fólkaskúlalærarayrkið ella námsfrøðingayrkið, og skal vera á slíkum støði, at hon verðurviðurkend sum grundarlag undir framhaldslestri til diplom ella MA, bæði í Føroyum og uttanlands.
Bachelorverkætlanin er ein ritgerð og ein munnlig próvtøka.

**Faklig krøv**
Verkætlanin skal verða skipað kring ein spurdóm, sum skapar karm um ritgerðina, og avmarkar valmøguleikarnar viðvíkjandi ástøði, hugtøkum, háttalagi og kanningarúrslitum.
Spurdómurin, sum verður valdur, ávirkar eisini heimildartilfarið, sum verður nýtt.

Í verkætlanini skal hin lesandi vísa síni evni at nýta vísindalig ástøði og háttaløg til at viðgera og greina eitt ávíst evni innan ávikavist lærara- ella námsfrøðingayrkið. Lesandi skulu duga at seta einstøku partarnar í ritgerðini í størri høpi og heild.

Viðgerðin skal vera sjálvstøðug, og tann lesandi skal sýna, at hon/hann á virknan hátt megnar at finna, velja, og brúka viðkomandi heimildir, ið skapa eitt haldgott grundarlag undir viðgerð og greining.

# Bachelorritgerðin

**Evni**
Tey lesandi velja sjálvi eitt evni innan ávikavist undirvísingarligu – og/ella námsfrøðiligu fakøkini.
Til tess at verða góðkent, skal valda evnið hava týdning ogvera viðkomandi fyri avvarðandi fakøki. Møguligt er at samráðast við undirvísarar um val av evni.
Vegleiðarin góðkennir evnið í samráð við útbúgvingarleiðara.

**Ritgerðin**
Ritgerðin skal hava ein almennan didaktiskan og/ella fak-didaktiskan part, ið fevnir um í minsta lagi ein triðing av uppgávuni. Tey lesandi kunnu skriva ritgerðina einsæris ella í bólki við í mesta lagi trimum luttakarum. Munnliga próvtøkan er einsæris, har tann lesandi ábyrgdast allari B.Ed.-ritgerðini.

**Háttalag**
Í ritgerðini verður dentur lagdur á, at lesandi á sjálvstøðugan hátt duga at arbeiða út frá einum breiðum ástøðiligum grundarlagi í eini samantvinnan við empiri.

Empiri kann savnast við t.d. **starvslæru frá triðja og fjórða lestrarári, eygleiðing og/ella samrøðum** og kann verða partur av verkætlanini. Lesandi hava rætt til at nýta **10 starvslæru- og 2 konferansutímar** til verkætlanina.

# Bachelorritgerðin

**Vegleiðing**
Ein av undirvísarunum á Námsvísindadeildini verður settur sum vegleiðari. Í ávísum førum kann vegleiðarin vera av aðrari deild á Fróðskaparsetrinum, ella uttan seturs.

Dekanurin/útbúgvingarleiðararnir tilnevna vegleiðarar. Dekanurin/útbúgvingarleiðararnir skulu eisini góðkenna møguligar broytingar í tilnevningum.

Lesandi hava rætt til hesar vegleiðingingartíðir í sambandi við bachelorverkætlanina:

| | |
|---|---|
| Ein lesandi: | 3 tímar |
| Bólkur við tveimum lesandi: | 4 tímar |
| Bólkur við trimum lesandi: | 5 tímar |

**Innlating**
Ritgerðin verður latin inn í seinasta lagi
**Fríggjadagin 24. mai 2024, kl. 12.00**
3 pappírseintøk av ritgerðini verða latin inn.
Teldutøkt eintak av ritgerðini, alt savnað í eitt pdf-skjal, skal somuleiðis latast inn í Wiseflow og sendast til nad@setur.fo.

# Bachelorritgerðin

**Próvtøka**
Bachelorverkætlanin endar við einsæris munnligari próvtøku.

Til próvtøkuna verður galdandi próvtalsstigi nýttur. Eitt próvtal verður givið fyri bachelorverkætlanina, ið umfatar skrivliga avrikið og munnligu próvtøkuna. Lesandi kunnu skriva ritgerðina í bólki, har munnliga próvtøkan er einsæris.

Í próvtalsmetingini vigar skrivliga ritgerðin mest, og tí ber bert til at lyfta próvtalið eitt stig við munnligu framløguni. Tað er tó onki mark fyri hvussu nógv stig próvtalið kann lækka.

Tíðin til munnligu próvtøkuna er 1) framløga av verkætlanini, 2) kjak og spurningar og 3) votering.

Munnliga próvtøkan er 45 min í alt, og umfatar:

- 15 min. framløga
- 25 min. kjak/spurningar
- 5 min. votering

Tann lesandi skal hava staðið skrivligu ritgerðina fyri at fara upp til munnliga próvtøku.

# Bachelorritgerðin

**Kærur**
Kærur í sambandi við próvtøku verða avgreiddar sambært ásetingunum í kapittul 6 a í *Løgtingslóg nr. 58 frá 9. juni 2008 um Fróðskaparsetur Føroya, sum er broytt við løgtingslóg nr. 51 frá 8. mai 2012.*

Kærur saman við skrivligum grundgevingum skulu stílast til dekanin á Námsvísindadeildini og sendast til deildarskrivstovuna nad@setur.fo

Kærufreistin er tvær vikur frá tí, at tann lesandi hevur fingið avgerðina at vita.

# Leiðbeinandi mannagongdir

**Ritgerðin.**

*Ritgerðin eigur at verða skipað í hesar partar:*

1. Inngangur/spurdómur/avmarking
2. Háttalag/ástøði/empiri
3. Viðgerð
4. Niðurstøður
5. Frásjónargerð

*Onnur formlig krøv til ritgerðina:*

- Innihaldsyvirlit
- Síðutøl
- Bókmentalisti/ávísingar: skulu verða uppsett eftir APA- aðalkravinum
- Skrift: Times New Roman
- Skriftstødd: 12-pkt.
  Í yvirskriftum kunnu aðrar støddir verða nýttar
- Millum linjurnar: 1,5
- Stødd av breddum: Ovast og niðast: 3 cm. Á síðunum: 2,5 cm.

**Ritgerðin í vavi**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 lesandi | 60.000 tekn | (+/- 10%) | 25 síður |
| 2 lesandi | 72.000 tekn | (+/- 10%) | 30 síður |
| 3 lesandi | 84.000 tekn | (+/- 10%) | 35 síður |

Tað er loyvt at hava í mesta lagi 20 síður viðkomandi fylgiskjøl
*(Roknað verður við, at ein síða telur 2400 tekn (tekn+millumrúm). Myndir, talvur, grafar o.t. verða tald við í kravda talið av teknum, meðan framsíða, innihaldsyvirlit, bókmentalisti og fylgiskjøl ikki telja við).*

# Leiðbeinandi mannagongdir

**Framsíða:**
*Á framsíðuni skal hetta vera upplýst:*

1. Uppgávuheitið skal vera á føroyskum og enskum
2. Skeiðsheiti og skeiðsnummar
3. Navn/nøvn á lesandi
4. Navn á vegleiðara
5. Dagfesting
6. Lestrarstovnur/-staður
7. Tal av teknum

**Vegleiðing**
Roknað verður við, at vegleiðari viðmerkir og ger uppskot um ábøtur/tillagingar til partar av skrivliga avrikinum. Hetta er tó ikki galdandi fyri lidna avrikið.
Øll vegleiðing steðgar 7 dagar undan tí, at ritgerðin verður latin inn.
Tann lesandi og vegleiðarin samskifta um millum annað hesi viðurskifti:

- Vegleiðingarhættir (fundir, samskifti umvegis telefon, teldupost o.a)
- Tíðarkarmar (t.e. hvussu nógv tíð er til taks til vegleiðingina, og hvussu hon verður skipað)
- Nær vegleiðarin skal hava eitt útspæl frá tí lesandi framan undan hvørjari vegleiðing, og hvussu eitt slíkt útspæl kann vera háttað
- Nær avmarking og spurdómsorðing skulu vera avgreidd.
- Hvat vegleiðarin skal gera viðmerkingar til
- Møguliga ávegis framløga (miðvegisframløga)
- Tann lesandi skal fáa fráboðan í seinasta lagi 48 tímar áðrenn munnligu próvtøkuna, um ritgerðin ikki er staðin.

# Leiðbeinandi mannagongdir

**Próvtøka**
Til munnligu próvtøkuna verður roknað við, at tann lesandi við støði í spurdóminum leggur fram útvaldar tættir í verkætlanini og útgreinar týðandi próvførslur og niðurstøður.

Eisini verður roknað við, at tann lesandi í orðaskiftinum við undirvísara / próvdómara sýnir, at hon/hann hevur gott innlit í evni og ástøði, viðkomandi fakliga og námsfrøðiliga vitan, og dugir at arbeiða við vísindaligum háttalag.

Hin lesandi skal sýna, at hon/hann er før(ur) fyri at hugsa sjálvstøðugt, at seta kritiskar spurningar og at skapa eina heildarfatan av viðgerðini

# Leiðbeinandi mannagongdir

**Hvat verður dentur lagdur á í sambandi við prógtøkuna?**

Í sambandi við prógdømingina verður mett um, í hvønn muntann lesandi:

- megnar at draga viðkomandi ástøði og hugtøk inn í uppgávusvarið, bæði í ritgerðiniog í munnliga partinum?
- nýtir viðkomandi og tíðarhóskandi bókmentir úr ymiskum máløkjum
- hevur eina sjálvstøðuga fatan av ástøði, hugtøkum og fyribrigdum, ið hon/hann viðger
- nýtir greiða og týðiliga prógførslu, sum í stóran mun er grundað á vísindaligar tekstirnýtir fakmál, ið hoyrir til viðkomandi fakøki
- dugir at skapa eina leinkju millum ástøði og yrkisroyndir
- hevur megnað at skipað ritgerðina soleiðis,at hon hongur saman og er løtt at lesa
- hevur megnað at skipað eina greiða og samanhangandi munnliga framløgu
- hevur megnað at svarað uppgávuorðingini
- nýtir góðan og greiðan málburð, setningsbygnað og rætta stavseting í skrivliga partinum

# Leiðbeinandi mannagongdir

**Gevið gætur:**
Gjørt verður greitt, at vegleiðarin við støði í ritgerðini kann mæla frá, at lesandi fer til munnliga prógtøku.

- Um lesandi ikki megnar at lata BEd -verkætlanina inn til ásettu tíð, missur tann lesandi eina av trimum prógtøkuroyndum og skal til endurprógtøku.

  Mannagongdin er hendan:

- Tann lesandi skal boða skrivstovuni og vegleiðara sínum frá hesi avgerð.
- Avtala verður gjørd við vegleiðara um nær tann lesandi skal lata BEd-verkætlanina úr hendi.
- Trý eintøk skulu latast skrivstovuni í pappírsformi, og eitt talgilt eintak, alt savnað í eitt pdf. -skjal, skal somuleiðis latast inní Wiseflow og sendast til skrivstovuna nad@setur.fo
- Stað og klokkutíð verða kunngjørd seinni.
- Tann lesandi hevur rætt til at varðveita sama evni og sama spurdóm, sum hann/hon hevur arbeitt við í vár.
- Eru ivamál ber til at seta seg í samband við Ninnu Reinert (ninnar@setur.fo) útbúgvingarsamskipara ella Irenu Tróndheim (irenat@setur.fo) lestrarvegleiðara.

# Leiðbeinandi mannagongdir

**Um lesandi ikki stendur próvtøkuna er mannagondin hendan:**

- Um tann lesandi ikki stendur BE.d-verkætlanina, missur tann lesandi eina av trimum próvtøkuroyndum og skal til endurpróvtøku.

- Lesandi skal í samráð við vegleiðaran leggja ætlan fyri vegleiðing og endurpróvtøku, stað og klokkutíð verða ásett.

- Tann lesandi hevur rætt til tvær munnligar vegleiðingar.

- Tann lesandi hevur rætt til at varðveita sama evni og sama spurdóm, sum hann/hon hevur arbeitt við í vár.

- Í summum førum kann vera neyðugt við einum nýggjum vegleiðara.

- Trý eintøk skulu latast skrivstovuni í pappírsformi, og eitt talgilt eintak, alt savnað í eitt pdf-skjal, skal somuleiðis latast inn í Wiseflow og sendast til skrivstovuna: nad@setur.fo

- Eru ivamál ber til at seta seg í samband við Ninnu Reinert (ninnar@setur.fo), útbúgvingarsamskipara ella Irenu Tróndheim (irenat@setur.fo) lestrarvegleiðara.